VIT ERU FARIN INN Í EITT **NÝTT ÁR** VIÐ BÆÐI NÝGGJUM OG GOMLUM AVBJÓÐINGUM, TRUPULLEIKUM OG VÓNUM FYRI **FRAMTÍÐINA**. NIÐANFYRI HYGGJA SEKS LEIÐANDI FÓLK UMBOÐANDI YMSAR SAMFELAGSBÓLKAR OG YMISK ÁHUGAMÁL INN Í **KRYSTALLKÚLUNA** OG KOMA VIÐ TEIRRA BOÐUM UPPÁ OG VÓNUM UM, HVAT **2010** FER AT BORÐREIÐA VIÐ.



## »Journalistikkurin verður betri«

### ANNA ELLINGSGAARD

*forkvinna í Føroysk Miðlafólk*



**Hvussu fer 2010 at hátta seg fyri føroyska fjølmiðlaheimin?**
Skjótu tíðindini eru vorðin ókeypis á netinum einaferð við alla. Tí mugu hinir miðlarnir savna seg um útgreinandi bakgrundsjournalistikk. Fíggarliga verður neyvan pláss fyri meiri enn trimum útgávum um vikuna hjá teimum stóru bløðunum. Kringvarpið fer at humpa víðari í sama lag, inntil myndugleikarnir fata, at tað kostar pengar at framleiða góðan journalistikk. Journalistfakliga støðið fer hinvegin sum heild at hækka, tí krøvini verða størri og fleiri eftirútbúgvingartilboð verða til miðlafólk. Eisini tí fólk eru troytt av lættisoppa og lata seg ikki longur lumpa av lýsingartilfari og spinndoktarii, sum roynir at síggja út sum journalistikkur.

**Hvat vónar tú fyri føroyskar fjølmiðlar og føroyskan fjølmiðlapolitikk í 2010?**
At okkara politikarar umsíðir vísa dirvi til at skapa fíggjarligar umstøður fyri eini væl virkandi pressu og síðani halda fingrarnar langt vekk og geva henni arbeiðsfrið. At Kringvarpið fer at savna seg um sínar skyldur í nýggja Public Service sáttmálanum og sleppur av við alt lýsingartilfar, so privatu miðlarnir fáa ein kjans at yvirliva og báðir partar harvið kunnu røkja sín týðandi leiklut í okkara fólkaræði. At starvsfólkini í Kringvarpinum umsíðir fáa arbeiðsfrið og bløðini fáa útberingarstuðul, sum veruliga munar. At allar journalistiskar kreftir verða savnaðar í einum fakfelag við einum nútíðar sáttmála, sum tryggjar okkum munandi betri arbeiðskor.

## »Sálarsjúk hava bíðað ósømiliga leingi«

### TORMÓÐUR STÓRA

*leiðari á Psykiatriska deplinum*



**Hvussu fer 2010 at hátta seg fyri psykiatriska økið í Føroyum?**
Vit koma væl longri í arbeiðinum at skapa eitt meira fjøltáttað og dygdargott viðgerðartilboð til psykiatriskar sjúklingar og teirra avvarðandi. Eg vænti, at vit koma at síggja meira til tær umskipanir, sum vit hava arbeitt við í strembanini eftir at skapa eina samskipaða røkt og viðgerð í psykiatriini. Hetta ger kanska eisini, at tað verður meira sjónligt, at tað eru nøkur økir í psykiatriini, sum ikki fáa nøktandi raðfesting. Eg vænti, at vit endiliga koma í gongd við at skipa virðiligar bústaðarmøguleikar til fólk við sálarsjúkum, sum hava bíðað ósømiliga leingi.

**Hvat vónar tú fyri føroyska psykiatri og føroyskan psykiatripolitikk í 2010?**
At vit koma longri á leiðini at minka um fordómar, mytur og tabu um psykiatriskar sjúkur, so tað gerst lættari at vera psykiatriskur sjúklingur í Føroyum. Eg vóni, at tað verða gjørdar nakrar greiðar politiskar raðfestingar, sum gera, at vit komandi árini kunnu seta fokus á fyribyrgjan og heilsufremjan á psykiatriska økinum. Samstundis at vit koma á mál í árinum við at leggja til rættis nýggja psykiatriska depilin, soleiðis at vit kunnu koma nærri strembanini eftir at geva psykiatriskum sjúklingum meiri virðilig viðurskifti undir innleggjan og samstundis kunnu seta ferð á eitt sera spennandi konsept fyri psykiatriska viðgerð, sum arbeitt verður við.

## »Pensjónistar við skerdum førleika verða verri fyri«

### SIGVALD KRISTIANSEN

*formaður í Landsfelag Pensjónista*



**Hvussu fer 2010 at hátta seg fyri føroyskar pensjónistar og eldraøkið?**
Hjá teimum pensjónistum, sum eru væl fyri til likams og sálar og hava eina inntøku afturat fólkapensjónini og samhaldsfasta, verður 2010 óbroytt frá undanfarnu árum. Hóast hægri avgjøld og skatt verður livihátturin hjá teimum ikki nervaður av fíggjarkreppuni. Pensjónistar við skerdum førleika, sum hava tørv fyri hjálp heima, verða verri fyri, tí heimahjálpin, sum er lítil frammanundan, verður enn meira niðursett. Hetta verður størsta avbjóðingin á eldraøkinum í 2010.

**Hvat vónar tú av føroyska eldrapolitikkinum í 2010?**
Størsta mál í eldrapolitikkinum í ár er støðutakan til nýskipan av pensjónini, sum vónandi verður til frama fyri komandi pensjónistar. Fyri núverandi pensjónistar verður ein nýskipan, sum higartil fráboðað, eingin bati, uttan so, at samhaldsfasta pensjónin hækkar munandi, tí grundupphæddin í fólkapensjónini verður minkað, avtikin. Ein livikorskanning hjá fólkapensjónistum verður liðug tíðliga í hesum ári, og vónandi kemur úrslitið at ávirka eldrapolitikkin til frama fyri teir pensjónistar, sum tørva mest hjálp.